# Beckham-mál ikki nóg mikið hjá KÍ

**KÍ fekk uppibornan javnleik á Svangaskarði hósdagin, og høvdu teir verið hepnari, kundu teir vunnið dystin ímóti ungverska liðnum.**

KÍ-ÚJPESTI
*Páll Holm Johannesen*

Í nógva vindinum á Svangaskarði, eydnaðist KÍ at fáa javnleik ímóti ungverska liðnum, Újpesti, í UEFA-Cup- kappingini.

Dysturin endaði 2-2, eftir 1-1 í hálvleikinum. KÍ spældi fult upp við ungverska mótstøðuliðið, og klaksvíkingar høvdu fult uppiborið javnleikin.

Størsta løtan í dystinum var uttan iva, tá Allan Mørkøre stutt inn í seinna hálvleik, í besta Beckham-stíli, royndi seg frá yvir 40-metrum, og bólturin sat handan málmannin hjá Újpesti.



*Allan Mørkøre hevur júst skotið mál úr 40 metra fjarstøðu, og Kí- leikararnir sum vera man fegnir*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Javnur fyrri hálvleikur

Nógvivindurin á Svangaskarði darvaði spælinum nógv, og tí var langt millum tað góða fótbóltspælið. Mesta spælið fór fram á miðjum vølli, og langt var ímillum málmøguleikarnar.

Újpesti legði betri fyri, og løgdu nakað av trýsti á KÍ-liðið, sum tóktist at hava torført við at fóta sær á hála vøllinum tí fyrstu løtuna. Újpesti fekk eisini mál longu eftir 13 minuttir.

Atli Danielsen ger eitt heldur óneyðugt fríspark uttanfyri Kí-brotsteigin úti í høgru, sum Újpesti-miðvallarin Henrik Rósa tekur. Bólturin frá ungverka landsliðsleikarinum lá væl, og við fremstu stong kundu verjuleikarin, Tamas Juhar, leggja gestirnar frammum 1-0.

Ikki fyrr enn tjúgu minuttir vóru farnir høvdu klaksvíkingar fyrstu royndina á mál, og tað var eitt skot frá Allani Mørkøre, sum fór framvið málinum hjá Újpesti.

Tað vóru annars ikki teir nógvu málmøguleikarnir í fyrra hálvleiki. Bæði liðini høvdu onkra forkølaða roynd, men ongin vandamikil støða kom fyrr enn beint fyri hálvleik.

Fyrst royndi føðingardagsbarnið, Atli Danielsen, seg við góðum skotið, sum málmaðurin fekk út til horna. Hornasparkið úr vinstru lá tætt at málinum, og vandamikil støða spurdist burturúr, men Ujpesti-verjuleikari fekk bóltin út-aftur til horna.

Seinna hornasparkið var úr høgru, og lá eisini tætt at málinum, og hesaferð eydnaðist Allan Mørkøre at fáa seiansta fót á, og so stóð 1-1.

KÍ leikti allan fyrra hálvleik í mótvindi, og hóast tað ofta er lættari at spæla í mótvindi, so høvdu klaksvíkingar torført við at fáa spælið at hanga saman.

Nógvi vindurin hevði eisini við sær, at nógvar skeivar sendingar vóru frá báðum pørtum.

## Allan enn einaferð

Dystargongdin í seinna hálvleiki líktist nógv henni í fyrra, har lítið sást til líkinda fótbóltspæl, og langt ímillum royndirnar á mál. Tíggju minuttir inn í seinna hálvleik, vóru áskoðararnir vitnið til eitt frágera gott mál frá Allani Mørkøre.

KÍ vinnur bóltin á miðjum vølli, og Allan Mørkøre setur ferð á, og komin nakað um miðjuna, ger hann ikki mætari, enn at skjóta frá yvir 40 –metra fjarstøðu, og bólturin fóru uppum Újpesti-málverjan, og so var KÍ frammanfyri 2-1. Málið líktist ikki sørt tí hjá David Beckham fyri nøkrum árum síðan, tá hann aftanfyri miðjuna, skeyt mál fyri Manchester United.

Hetta var vorðin sum dagur í viku hjá Allan Mørkøre, tí undan dystinum ímóti ungverska liðnum, hevði hann aldrin skotið mál í Evropa Cup, og nú tað endiliga eydnaðist honum, skeyt hann ikki færri enn tvey mál

Í seinna hálvleiki vóru bert hendinga royndir á mál, og meginparturin av spælinum var á miðjum vølli, har liðini skiftust um at trýsta.

KÍ megnaði at halda leiðsluna í 15 minuttir, men so svaraði Újpesti aftur. Klaksvíkingar missa bóltin í uppspælinum í høgru, og verða revsaðir við beinanvegin. Tvær avleveringar millum Újpesti-leikarar, og so lá bólturin í netinum. Innskifti Balaszar Farkas skeyt hesaferð málið hjá gestinum, eftir at hava fingið eina sending frá slovakanum, Radek Sloncik.

Tað, sum eftir var av dystinum, royndi hvørgin partur rættiliga at fara eftir sigrinum, og tí hendi ikki tað stóra seinasta korterið, og dysturin endaði sostatt 2-2, og tað mugu báðir partar verða nøgdir við. Sum dysturin lagaði seg, so var javnleikur eisini rætta úrslitið á Svangaskarði hósdagin.

## Henrik Larsen til staðar

Nýggji landsliðsvenjarin, Henrik Larsen, var á Svangaskarði hósdagin.

Fýra KÍ-leikarar skulu um vikuskiftið á venjingarlegu við landsliðnum, og ímillum Atla Danielsen, Ova Nysted, Hjalgrím Elttør og Heðin av Lakjuni, var tað avgjørt Hjalgrím Elttør, sum glógvaði mest. Hann stríddist væl, og hóast ringa veðrið, so fekk hann í løtum víst, hvør dugur er í honum.

Ove Nysted stóð eisini væl í miðverjuni, men um avrikið hóskvøldið er nóg mikið at sannføra landsliðsvenjaran um eitt fast pláss, er heldur ivasamt.

Føðingardagsbarnið, Atli Danielsen, hevði trupulleikar, serliga í fyrra hálvleiki, tí Újpesti-leikararnir komu meir enn einaferð ígjøgnum í síðuni hjá Atla. Atla skal tó hava rós fyri, at hóast hann ikki er meira enn 19 ár, so er hann ikki bangin fyri at halda uppá bóltin, og tá hann hevur bóltin, sleppur hann sær sum oftast skilagott av við hann.

Heðin á Lakjuni var heldur anonymur á Svangaskarði, og tá hann hevði bóltin, spurdist ikki tað stóra burturúr. Hann stríddust tó væl, og spennandi verður um kviki klaksvíkingurin verður við frá fyrsta bríksli ímóti Liktinstein.

## KÍ vantar áleypara

Til dystin ímóti Újpesti spældi KÍ 4-5-1, við Bjarta Vattelstad sum fremsta manni, har uppgávan hjá Allani Mørkøre, Hjalgrím Elttør og Heðini av Lakjuni var so at stuðla norðmanninum.

Tað er sjálvandi altíð torført at vera einsamallur maður á toppinum, men Bjarte Vattelstad fekk sera lítið burturúr ímóti ungverjunum.

Hann hevur ikki staðið seg væl higartil í landskappingini, og avrikið hósdagin var eisini lítið sannførandi. Bjarte hevði onga roynd á mál, og hann var sera lítið víð uppspælinum hjá KÍ.

Norðmaðurin skal sjálvsagt hava tíð at venja seg við undirlagið í Føroyum, og nýggju liðfelagarnar úr KÍ, men nú hevur hann verið í Føroyum í skjótt ein mánað, og innan ikki alt ov langa tíð, verður hann noyddur at sannføra klaksvíkingar um, at hann veruliga er verdur at satsa uppá.

Í løtuni trýtur við áleyparum í Klaksvík, tveir teirra eru at finna í verjuni, nevnliga Ove Nysted og Alexander Djordjevic. Báðir hava hava skotið mál í álopinum, men samstundis skal vera sagt, at báðir eisini standa seg væl í verjuni, so spurningurin er hvussu nógv er vunnið við at flyta teir longur framm á vøllin.

Kurt Mørkøre er farin undir at trappa niður, og hósdagin var hann ikki frægt sum á beinkinum, og í ár hevur leikandi KÍ-venjari ikki spælt tað stóra, og tí verður tað neyvan Kurt, sum skal loysa álopstrupulleikan hjá KÍ.

**Dysturin í tølum:**

KÍ-Ujpesti 2-2 (1-1)
0-1 Tamas Juhar
1-1 Allan Mørkøre
2-1 Allan Mørkøre
2-2 Balascz Farkas

**KÍ:** 1.Meinhard Joensen, 6. Atli Danielsen, 19. Ove Nysted, 13. Alexander Djordjevic, 14. Rúni Elttør, 9. Allan Mørkøre, 3. Allan Joensen, 8. Jan Joensen(4. Jan Andreasen), 18. Heðin á Lakjuni(5. Harley Bertholdsen), 10. Hjalgrím Elttør og 12. Bjarte Vattlestad( 17. Erling Fles)



*Norðmaðurin, Bjarte Vattelstad, var lítið sannførandi á Svangaskarði, og varð eisini útskiftur tíðliga í seinna hálvleiki.*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Újpesti-venjarin, Laszlo Molnar:

## -Væntað sær torførari dyst

FÓTBÓLTSPRÁT
*Páll Holm Johannesen*

Slovakski venjarin hjá Újpesti, Laszlo Molnar, var ikki nøgdur við avrikið hjá sínum á Svangaskarði.

– Nei eri eg ikki nøgdur við avrikið, tí vit lata tvey bílig mál fara inn, segði Laszlo Molnar eftir dystin.

Újpesti venjarin er fyrrverandi landsliðsmálverji hjá Slovakia, og hevur tvær ferðir leikt ímóti føroyska landsliðnum, og tí væntaði hann sær ein torføran dyst á Svangaskarði.

– Út frá mínum royndum ímóti føroyska landsliðnum, hevði eg satt at siga væntað ein torførari dyst, men kanska tíbetur fyri okkara menn, so gjørdist dysturin eitt sindur lættari enn væntað, tí vit spæla ikki væl í dag, greiðir Laszlo Molnar frá.

Spurdur um hann væntaði, at Újpesti kom víðari í kappingini, svaraði Laszlo Molnar, at umstøðurnar í Budapest vera nakrar heilt aðrar enn á Svangaskarði, og við tí í huga, at vit skjóta tvey mál í dag, so væntað eg at vit koma víðari.

At enda segði Laszlo Molnar, at hann hevði alt gott at bera føroyskum fótbólti, og at fólkið í føroyum var sera fyrikomandi. Serliga dámdi honum mátan, føroyingar spældu fótbólt uppá, tí sum hann sjálvur segði, so tordu føroyingar at spæla fótbólt, og tað sást týðuligt, at Føroyar var ein fótbóltstjóð, og hann rósti ikki minst ítróttarandanum, sum hann helt vera heilt í topp.

Tvímálsskjúttin, Allan Mørkøre:

## -Keðiligt, vit ikki vunnu



*Endliga eydnaðist tað Allani Mørkøre at skjóta mál í Evropa Cup. Seinna málið var ein sonn perla frá Allan, sum leikti sín fyrsta Evropa Cup- dyst fyri tíggju árum síðani*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

FÓTBÓLTSPRÁT
*Páll Holm Johannesen*

Tvímálsskjúttin hjá KÍ á Svangaskarði, Allan Mørkøre, var væl nøgdur við úrslitið, men helt kortini, at tað var keðiligt, at KÍ ikki vann dystin.

Spurdur hvussu seinna málið kom, svaraði Allan, at Allan Joensen vinnur bóltin á miðjuni, og spælir seg, og eftir eitt trekk, sá hann, at málmaðurin hjá teimum var langt úti, og so var bara at royna, og tað var bara deiligt, at tað eydnaðist at skora.

Allan Mørkøre var serliga nøgdur við liðavrikið.

– Vit stríðast rættiliga væl í dag, og tað sum er mest gleðiligt, er at vit tora at spæla, og tað er avgjørt høvuðsorsøkin til at vit koma so væl úr dystinum, segði Allan eftir dystin.

Allan fegnaðist eisini um, hvussu væl teir ungu á KÍ-liðnum stóðu seg, og at úrslitið av dystinum avgjørt var eitt tekin um, at føroyskur fótbóltur er á veg frammeftir.

Spurdur, um hann helt at nakar einstakur spælari stóð seg serliga væl, svaraði Allan, at øll verjan spældi væl, men samanumtikið var talan um eitt frammúr gott liðavrik.

Allan var eisini við á liðnum hjá klaksvíkingum, sum á fyrsta sinni var við í Evropa Cup afturi í 1992, men málini hóskvøldið vóru kortini tey fyrstu hjá klaksvíkinginum í Evropa Cup. Allan hevur umboðað KÍ, HB og íslendska felagið KR í evropeiskum kappingum.

Nú Henrik Larsen var ímillum áskoðaranar, spurdu vit Allan, um hvørjar vónir, hann hevði, um at endurvinna sær pláss á landsliðnum, svaraði hann, at tað hugsaði hann ikki so nógv um í løtuni, men vísti á, at nýggi landsliðsvenjarin hevði sæð hann spælt tveir ferðir, og báðar ferðir hevði eydnast honum at skjóta mál, so tað boðaði bara frá góðum, segði Allan at enda smílandi.

Heðin á Lakjuni:

## -Rímuliga væl nøgdur



*Heðin á Lakjuni helt tað vera harmiligt, at KÍ ikki megnaði at halda tørn við 2-1. Kortini trýr hann enn uppá at koma víðari í kappingini.*

*Mynd:Álvur Haraldsen*

FÓTBÓLTSPRÁT
*Páll Holm Johannesen*

Kviki vongurin hjá klaksvíkingum, Heðin á Lakjuni, var rímuliga væl nøgdur við úrslitið.

– 2-2 er eitt gott úrslit, men eftir at vit førdu 2-1, er tað eitt sindur harmiligt, at vit ikki halda fast, og tí eri eg ikki meir enn rímuliga væl nøgdur við dystin, segði Heðin á Lakjuni eftir dystin.

Heðin vísti eisini á, at útgangspunktið til seinna dystin er nógv verri nú, enn um KÍ hevði kláráð at hildið tørn við 2-1. Kortini trýr Heðin á Lakjuni uppá at koma víðari.

– Tað verður sjálvandi ótrúliga torført at vinna niðri í Ungarn, men vit eru noyddir at trúgva uppá tað, sigur Heðin.

Heðin á Lakjuni var eisini við seinast KÍ møtti Újpesti afturi í 1997, og tá minnist Heðin, at tað var sera heitt at spæla í Budapest, og hann vónar, at umstøðurnar verða øðrvísi hesaferð.

Ein av áskoðarnum á Svangaskarði var Henrik Larsen, og tá Heðin varð spurdur um hvørjar vónir, hann hevði, um at byrja inni í landsdystinum ímóti Liktinstein, svaraði hann, at hann vónar at fáa møguleikarn frá fyrsta bríklsli, men nú fáa vit at síggja.